UTTAN ÚR HEIMI

## Heldur Blair enn Bush

Tað er líkt til, at bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, er hægri í metum í USA enn amerikanski forsetin.

Ein meiningakanning, sum varð almannakunngjørd í amerikonskum fjølmiðlum fyrradagin, vísti, at 58 prosent av amerikanarunum halda Blair vera ein dugnaligan stjórnarleiðara. Tá tey fingu sama spurning um George W. Bush, vóru tað bara 43 prosent, sum hildu hann vera ein dugnaligan stjórnarleiðara. Hetta er kanska ein uggi hjá Blair, tí ein tilsvarandi kanning í Evropa fyrr í ár vísti, at hann er ikki serliga nógv avhildin hesumegin Atlantshavið.

Kanningin vísti eisini, at amerikanararnir halda nógv av ST-aðalskrivaranum, Kofi Annan, og av Jóhannesi Páll páva. Harafturímóti er franski forsetin, Jacques Chirac, ikki serliga nógv avhildin í USA.

## Harðar ákærur ímóti Kerry

Demokratiska forsetavalevnið í USA, John Kerry, fær harða viðferð í einari bók, sum júst er útkomin.

Høvundurin, sum eitur John O'Neill, var í amerikanska herflotanum í Vietnamkrígnum eins og Kerry. Undir valstríðnum hava ráðgevar Kerrys gjørt nógv burturúr, at Kerry fekk trý heiðursmerki undir krígnum, men John O'Neill vil vera við, at í tveimum av førunum hevði Kerry volt sær sjálvum skaða. Tí hevði hann bara tað eina heiðursmerkið uppiborið, skrivar hann.

Undir valstríðnum hevur Kerry eisini nýtt eina plakat við einari mynd av sær sjálvum og 19 øðrum hermonnum frá Vietnamkrígnum. Ein av hermonnunum, William Shumadine, hevur mótmælt hesum. Hann sigur, at minst 11 av teimum 19 hermonnunum stuðla Bush og ikki Kerry, og tí heldur hann tað vera skeivt av Kerry at n+yta myndina í valstríðnum.

## Kanna svik hjá Pinochet

Elsti sonur fyrrverandi forsetan í Kili, Augusto Pinochet, varð tikin ólavsøkudag og skuldsettur fyri svik.

Sambært myndugleikunum hevur Augusto Pinochet Hirati verið uppi í einum bólki, sum hevur selt stolnar bilar. Undir kanningunum er komið fram, at sonurin hevur nógvar pengar standandi í einum banka í USA, og nú verður kannað, um allir pengarnir stava frá ólógligu bilasøluni, ella um okkurt annað er uppií. Amerikanskar kanningar hava fyrr avdúkað, at kona gamla Pinochet, Luisa Hirati, hevur framt skattasvik, og at hon hevur brúkt tann amerikanska bankan til at fjala pengar, sum hon átti at rinda skatt av.

Myndugleikarnir í Kili kanna øll fíggjarviðurskiftini hjá gamla forsetanum. Tá Pinochet tók við eftir kvettið í 1973, átti hann bara eini vanlig hús og ein lítlan bil. Seytjan ár seinni átti hann ellivu stór hús. Fleiri teirra vóru í teimum dýru býarpørtunum í høvuðsstaðnum Santiago.

## Tað størsta mistakið

Svenski søgumaðurin Peter Englund vil vera við, at kríggið í Irak er tað størsta hernaðarliga mistakið síðani kríggið í Vietnam.

Peter Englund hevur skrivað fleiri bøkur um kríggj og hernaðarsøgu. Hann sigur við norska blaðið Dagsavisen, at amerikanska leiðslan visti als ikki, hvat hon gjørdi, tá hon gjørdi av at leypa á Irak. Hann sigur eisini, at amerikanska málið við álopinum var at gera USA tryggari at búgva í og at avmarka vandan fyri yvirgangi, men at úrslitið er tað beint øvugta.

Peter Englund heldur, at kríggið í Irak hevur eisini avdúkað, at USA er ikki so sterkt, sum vit fyrr hava hildið. Hann vísir á, at síðani Berlinmúrurin fall, hevur USA verið roknað sum heimsins einasta stórveldi, men at kríggið í Irak hevur avdúkað, at landið er ikki so sterkt, sum bæði amerikanarar og onnur hava hildið.

# Amerikanarar skulu fáa sannleikan at vita




*John Kerry og varaforsetaevnið John Edwards vórðu dúgliga fagnaðir á landsfundinum hjá demokratunum í Boston*

*Mynd: Reuters*

**John Kerry, sum nú alment er forsetavalevni hjá demokratunum, sigur, at altjóða samfelagið skal aftur fáa álit á USA**

VALSTRÍÐ

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Framman fyri 20.000 áhoyrarum kunngjørdi John Kerry, senatotur, gjáramorgunin, at hann tók av tilboðnum frá flokki sínum um at stilla upp á forsetavalinum 2. november, og at hann ætlar sær at fella George W. Bush, forseta.

Í røðuni, sum verður hildin at fáa avgerandi týdning fyri møguleikar hansara at vinna valið, segði Kerry, at undir hansara leiðslu fer USA ongantíð í kríggj, tí landið vil sleppa í kríggj, men at tað verður bara gjørt, um tað er alneyðugt.

Við hesum staðfesti hann eina ferð enn, at hann er ímóti tankanum hjá Bush um fyribyrgjandi kríggj. USA skal ikki í kríggj, uttan so at landið er hótt, segði Kerry. Hann legði afturat, at undir hansara leiðslu skulu amerikan-ararnir fáa sannleikan at vita, og at hann fer at leggja dent á at endurreisa álitið, sum USA hevur mist í umheiminum. Í hesum sambandi ætlar hann at styrkja sambandið við landsins sameindu í bardaganum ímóti yvirgangi.

Í takkarrøðuni nam Kerry eisini við búskapin. Hann segði, at hann hevur sett sær fyri at skerja hallið á fíggjarlógini niður í helvt tey næstu fýra árini. Hann vísti á, at Bush-stjórnin hevur støðugt lækkað skattin hjá vinnufyritøkunum, men at hann ætlar sær at steðga tí.

Kerry segði eisini, at ein stjórn undir hansara leiðslu fer ikki at privatisera ta almennu trygdina ella at skerja tær almennu veitingarnar. Stjórnin fer heldur at gera størri íløgur í nýggja tøkni og alternativa orku, so USA ikki skal verða so heft at útlendskari olju longur.

### Dregur frá Bush

Meiningakanningar í USA teir seinastu dagarnar hava víst, at John Kerry hevur fingið størri og størri undirtøku undir landsfundinum hjá demokratiska flokkinum, sum var í Boston.

Tann seinasta kanningin, sum kanningarstovnurin Zogby America hevur gjørt, og sum varð almannakunngjørd í gjár, vísir, at 48 prosent av veljarunum styðja John Kerry, og at 43 prosent styðja George W. Bush. Fyri einari viku síðani vísti ein kanning, at tað stóð at kalla á jøvnum teirra millum.

# Banamaður Nixons funnin deyður

**Fred LaRue, sum eftir øllum at døma var maðurin, sum avdúkaði lutin hjá Richard Nixon í Watergate-gøluni, varð funnin deyður hósdagin**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært blaðnum Biloxi Sun Herald er einki, sum bendir á, at nakar hevði gjørt seg inn á tann 75 ára gamla Fred LaRue, nú hann varð funnin deyður.

LaRue hevur ofta verið nevndur sum keldan hjá blaðmonnunum Bernstein og Woodward, ið avdúkaðu Watergate-gøluna, ið at enda noyddi Richard Nixon, forseta at leggja frá sær í 1974. Hann doyði í 1994.

Bernstein og Woodward hava alla tíðina sýtt fyri at avdúka kelduna, sum vanliga gongur undir navninum "Deep Throat". Fred LaRue avsannaði, at hann var høvuðskeldan, men hann viðgekk, at hann var ein av keldunum, sum feldu Nixon. Nógv halda kortini, at hann var "Deep Throat".



# – Lat okkum taka altjóðagerðina sum eina avbjóðing

**– Eg vóni, at vit politikarar, vinnulív og samfelagið alt lærir av okkara ítróttarligu og mentunarligu framherjum, sum hava prógvað, at heimurin eisini liggur opin fyri okkum føroyingum, um vit bert gera okkara arbeiði til lýtar. Lat okkum tí taka altjóðagerðina sum eina avbjóðing heldur enn eina hóttan og eina forðing. Eg vóni, at samgongan og andstøðan fara at megna at draga eina og somu línu, serliga í stórmálum, og at vit fáa eitt virðiligt samstarv, segði Jóannes Eidesgaard m. a. í fyrstu ólavsøkurøðu síni**



*Jóannes Eidesgaard, sum er tann 11. løgmaðurin í røðini síðani heimastýrislógina, helt ólavsøkudag sína fyrstu ólavsøkurøðu*

Neyvan nakað annað lóggevandi ting í heiminum verður sett við slíkum hátíðarrómi sum aldargamla løgting okkara á sjálvum tjóðardegnum - henda hásummardag, tá land og fólk hava latið seg í sítt vakrasta skrúð og eina løtu hava lagt tað gerandisliga til síðis. Høvuðsstaðurin heilsar flaggprýddur øllum landsmonnum og teimum mongu gestunum úr útlondum. Politikarar hava eftir gomlum siði gingið skrúðgongu saman við prestum og embætisfólkum oman í Dómkirkjuna til gudstænastu. Komin niðan aftur á Vaglið, verður skrúðgongan møtt av fjølmentari mannamúgvu, og tíðin eins og steðgar á, tá hesin vakri sangurin rungar av Tinghúsvøllinum.

Í øllum hesum hátíðarliga byrjar so eisini politiski veruleiki okkara. Ein politiskur gerandisdagur, sum langt frá altíð kennist so hátíðarligur. Ein politiskur gerandisdagur, har fólksins kosnu kvinnur og menn eftir bestu sannføring royna at finna loysnir, sum skulu menna okkara land til eitt gott land fyri okkum øll og okkara eftirkomarar at búgva í. Uttan mun til hvørji vit eru, hvørja politiska hugsjón vit hava, um vit eru í samgongu ella andstøðu, ja so hava vit eina felags vón um einar góðar Føroyar.

Onkur vil ivaleyst vera við, at tað er ov lítið hábærsligt, ella at visionera flogið er ov lágt, at ein politisk samgonga einans hevur sett sær sum mál at skapa eitt gott samfelag fyri øll. Rætt er tað, at tað eru ikki tey stóru slagorðini ella tey stóru armsveiggini, men hinvegin hýsir hetta bjartasta málið, ein samgonga kann seta sær. At leggja tey menniskjansligu virðini í politikkin, so at politikkurin alla tíðina hevur sum mál at skapa eitt betri og eitt tryggari samfelag - lata politikkin stutt og greitt snúgva seg um menniskjuni.

Olof Palme segði m.a.: *"Politikkur merkir, at vit finna saman til tess at loysa felags uppgávur. Politikkur merkir, at vit seta okkum mál fyri samfelagsgongdina. Hesi mál skulu fevna um eitt gott samfelag, sum vit skulu byggja í felag".*

Hóast grá skýggj reka inn yvir okkara búskap, er tað ongantíð meira neyðugt enn nú, at vit eiga viljan ikki bert til at varðveita, men til framhaldandi at útbyggja okkara vælferðarsamfelag. Men hesin vilji hevur sum fortreyt, at okkara vinna við nýhugsan og áræði støðugt megnar at bera hesar útbyggingar. Tí mugu vinnan og politiski myndugleikin samstarva - eitt samstarv, har báðir partar virða tey sjálvsøgdu mørk, sum eiga at vera millum vinnu og politikk - eitt samstarv, sum byggir á viljan til at koma víðari. So hóast hesi gráu skýggini skugga fyri sólini, er hetta ikki løtan til at fella í fátt, men tvørturímóti løtan at bróta upp um armar og í felag at bjóða framtíðini av.

Løgtingsval var í úrtíð 20. januar í ár, og tveir dagar seinni skipaði løgtingsformaðurin fyri formansumfari. 31. januar var samgonguskjalið við heitinum "Breiða semjan" undirskrivað av Sambandsflokkinum, Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum. Fyrsti løgtingstingfundur eftir valið var 3. februar, har nýggja løgtingsmanningin var góðkend, løgtingsformaður og løgmaður valdir og landsstýrið síðan skipað.

Hetta er fyrstu ferð, at hesir tríggir flokkar eru gingnir saman um at skipa politiska samgongu á Føroya Løgtingi.

Tá samgonguskjalið fekk heitið "Breiða semjan", var tað ikki av tilvild. Semjan leggur upp til, at vit fáa politiskan stabilitet og arbeiðsfrið, sum eru avgjørdar fortreytir fyri, at sett mál verða rokkin.

Samgongan er breið, tí hon telur heili 21 tingfólk - hon er breið, tí hon fevnir rættiliga breitt politiskt. Men innihaldið í breiðu semjuni fevnir fyrst av øllum um málið at finna breiða loysn á nøkrum stórmálum. Her verður serliga hugsað um sjálvstýrismálið umframt neyðuga nýhugsan, tá tað snýr seg um vinnupolitisk tiltøk.

Sjálvstýrismálið skal leggjast soleiðis til rættis, at hetta ikki longur er eitt øsingarmál, og at øll tilgongdin nú verður á føroyskum hondum og ikki longur trætumál við danskar myndugleikar. Vit snøgt sagt føroyska ella yvirtaka sjálvstýrismálið.

Sjálvstýrismálið skal gerast ein søk fyri ta breiðu fjøldina av føroyingum, har føroyingar sjálvir taka avgerðirnar innan teir karmar og tær heimildir, sum veruleikin gevur okkum.

Í sjálvstýrismálinum eru fýra tættir:

- nýggj stjórnarskipan
- yvirtøkulógin
- lóg um víðkaðar uttanríkispolitiskar heimildir
- hernaðarsamtyktin

Hóast týðandi viðurskifti eru broytt í mun til upprunaligu ætlanina við einari føroyskari grundlóg, er samgongan samd um, at arbeiðið skal halda fram. Stórt arbeiði er fingið frá hondini, og fyrra flaggdagsálitið varð handað landsstýrinum í vár. Málið er nú at gera nýggja stjórnarskipan, sum skipar alt samfelagið, men harumframt eisini skal lýsa, hvussu vit føroyingar skulu bera okkum at, um vit velja at siga upp verandi ríkisrættarligu støðu okkara.

Vónandi fer tað at bera til at koma við nýggjum áliti, áðrenn langt um líður, har eitt fullfíggjað uppskot, sum er viðgjørt av einari fullmannaðari nevnd, og eisini, sum ásett í lógini, hevur verið viðgjørt av Føroya fólki. Síðan skal uppskotið leggjast fyri løgtingið og fyri fólkið á einari fólkaatkvøðu.

Yvirtøkulógin fer at hava við sær, at øll málsøki kunnu verða yvirtikin sambært løgtingslóg, so hvørt sum politiskur vilji er til tess á løgtingi. Tó verða nøkur málsøki, sum lógin ikki fevnir um, ið einans kunnu verða yvirtikin, um Føroyar skipa seg sum sjálvstøðugt land. Tey eru uttanríkis- og verjupolitikkur umframt heimarættur, hægstirættur og peningapolitikkur. Stóra nýskapanin við yvirtøkulógini er, at allar yvirtøkur verða framdar eftir hesi lóg, og at hon leggur upp í hendurnar á føroyskum myndugleikum einsamøllum at gera av, nær málsøki bæði innanfyri og uttanfyri heimastýrislógina koma á føroyskar hendur. Eftir ætlan kemur nýggja yvirtøkulógin í gildi 1. januar 2005.

Landsstýrið arbeiðir nú við at fyrireika tær yvirtøkur, sum semja er um at fremja, og sum eru fíggjarliga forsvarligar við verandi búskaparstøðu. Av hesum er fólkakirkjan tann týdningarmesta.

Í setunarrøðu síni í 2002 legði danski forsætismálaráðharrin upp til, at Føroyar og Grønland skuldu hava víðkaðar ræsir á tí uttanríkispolitiska pallinum. Lógin fer at hava við sær, at Føroyar verða virkisførar í altjóðasamfelagnum og kunnu gera sáttmálar við onnur lond ella millumtjóðafelagsskapir í yvirtiknum málum. Tá verður ikki neyðugt at biðja danska uttanríkismálaráðið um heimild. Sostatt kunnu føroyskar sendinevndir fara undir samráðingar eftir egnum tørvi og av sínum eintingum í øllum yvirtiknum málum.

Hernaðarsamtyktin, sum løgtingið samtykti í vár, fer at gera føroyska leiklutin munandi meira virknan, tá tað snýr seg um trygdar- og verjupolitikk. Gomlu hernaðarsamtyktirnar gjørdu mangan tað, at føroyskir myndugleikar ikki fingu virkað til fulnar, tá tað snúði seg um hernaðarmál. Við støði í Svørtubók og Reyðubók, har reyði tráðurin heilt týðiliga er, at føroyskir myndugleikar vórðu hildnir uttanfyri og ikki høvdu møguleika at ávirka avgerðirnar, so verður í nýggju hernaðarsamtyktini lagt upp til, at føroyskir myndugleikar skulu hava fult innlit og møguleika at ávirka tær avgerðir, sum snúgva seg um føroyskt landa-, sjó- ella loftøki.

Henda samtykt gevur trygdarpolitikkinum eitt heilt annað innihald og lýsir mannagongdir fyri eitt málsøki, vit ikki í verandi støðu kunnu yvirtaka.

Við hesum lóggávum er sjálvstýrismálið vorðið okkara.

At víðka uttanríkispolitisku heimildirnar er eisini eitt natúrligt stig at taka, nú alheimsgerðin hevur tikið dik á seg. Evropasamveldið er farið undir eina felags stjórnarskipan, ið líðandi fer at flyta uttanríkis-, trygdar- og verjupolitikkin frá limalondunum til samveldismyndugleikarnar í ES við einum felags uttanríkismálaráðharra, og er hetta eisini ein greið orsøk til at fáa eina slíka lóg samtykta.

Enn hava vit ikki lýst møguligar avleiðingar, ein ES-grundlóg fer at fáa á ríkisfelagsskapin. Tískil fari eg á ríkisfundinum at umrøða hetta, soleiðis at vit tryggja okkum, at hesar avleiðingar verða lýstar.

ES er okkara høvuðsmarknaður. At ES er víðkað við fleiri limalondum ger, at Føroyar hava fingið fríhandilsavtalur við átta lond afturat í Eysturevropa. Til tess at vit kunnu fáa eitt meira skikkað orðaskifti um henda marknað, fer landsstýrið at skipa fyri eini ráðstevnu komandi ár við tí endamáli at útvega okkum meira vitan og kunning.

Hóast búskapurin í síni heild er væl fyri, mugu vit

*Framhald á næstu síðu*